# Hans Fróði hevur stigið fótin á

**Ja, so var enn ein føroyingur, ið náddi at veruleikagera stóra dreym sín úti í heimi. 31 ára gamli Hans Fróði Hansen hevur fingið samstarv í lag við kendasta og dugnaligasta make-up artistin í Hollywood, Alexis Vogel. Hans Fróði og Alexis arbeiða í løtuni við saman at geva út bók innan yrki teirra, og ein kann bert staðfesta, at her gongur við rúkandi ferð. Hans Fróði Hansen livir av røttum "life in the fast lane", sum tey taka til í Hollywood**



*Heimskendi make-up artisturin Alwxis Vogel og Hans Fróði Hansen*

LÍVSSTÍLUR
*Henrietta Hammer*
*Henrietta@sosialurin.fo*
*Mynd: Hans Fróði*

Hans Fróði kemur við einum fittum smíli gangandi ímóti mær, og eg veit alt fyri eitt, at her er nakað serligt, ið tosast skal um. Vit sessast við einum góðum koppi av kaffi, og hann bergtekur meg við søgu síni.

*Hví yrkið sum stylist?*

– Mær hevur altíð dámað væl tað, ið hevur við klæðir at gera. Eg minnist væl, at pápi mín, ið er av gamla "fiskaraslagnum", helt meg vera heldur váðamiklan at fara í holt við hetta yrkið, men hann hevur ongantíð ivast í valinum, ið eg tók og er errin av mær í dag. Eg minnist væl, at eg brendi fyri klædnasniðgevan, men valdi heldur fótbóltin, tí hetta tyktist tá at vera tað meiri vanliga og "fornuftiga" at gera. Men nú veit eg, at eg tók røttu avgerðina, sigur Hans Fróði.

### Alexis Vogel og bókin

– Mítt yrki sum stylist hevur verið alt annað enn lætt og dreymakent. Fólk halda kanska, at hetta bert er eitt hugnaligt og kreativt arbeiði, men tað krevur í veruleikanum nógva tíð og orku. Eg havi stríðst miðvíst fyri hesum í útvið 15 ár, og endiliga hevur eydnan verið við mær, sigur Hans Fróði Hansen.

– Eg havi kent nógvan mótgang í yrki mínum, men eg havi ongantíð ivast eina løtu. Eg eri vælsignaður við sterkum persónleika og sjálvsáliti og eri sera framsíggin, og tískil takið eg mær ikki stórvegis av neiliga kritikkinum, ið mær er fyri til dagligt, sigur Hans Fróði.

– Eg havi nýtt mína orka á rættan hátt, og henda sannroynd sæst nú aftur; eg havi nevniliga fingið ein heimskendan make-up artist at arbeiða fyri meg. Alexis Vogel, ið er make-up artistur fyri m.a. Shakiru, Paulu Abdul og Kelly Clarkson, fer í januar at geva út bók saman við mær. Alexis og eg geva út bók, ið samansjóðar make-up og styling. Hugskoti um at Alexis og geva ein bók út saman, er sera væl móttikið í Amerika, so spennandi verður at síggja, hvussu móttøkan verður. Ein av teimum størstu agentinum innan amerikanska bókaheimin hevur nevniliga játta seg til at umboða bók okkara. Hetta gevur okkum eina ófatiliga styrki og fyrimun, sigur Hans Fróði. Sáttmálin við Alexis hevur styrkt meg enn meir og givið mær áræði og samstundis lært meg, at um ein bert trýr, so letur alt seg gera, sigur Hans Fróði.

– Vit hava eisini gjørt eina avtalu, sum inniber at hon kemur at arbeiða fyri meg. Alexis kemur at gerða sína Makeup Linju sjálv, men við mínum vørunavni (Miss KayKay) og hon verður á marknaðum fyrst í komandi árið í USA, greiður Hans Fróði frá við einum lítlum smíli.

– Alexis og eg koma at arbeiða sera væl saman. Orsøkin er uttan iva tann, at vit eru ólík. Hon hevur búð í einum stórbýi, har framgongdin er sera stór, meðan eg komið úr Leirvík. Samanspælið okkara millum tykist vera framúr, sigur Hans Fróði. Alexis dámdi konsepti beinavegin og mína persónleika. Hon metti meg millumannað hóska fullkomið til yrkið, sum stylistur í Ameriku, greiðir Hans Fróði frá.

– Sigast skal eisini, at eg eri sera heppin við teimum, sum eg starvist við í míni fyritøku. Eg kenni øll væl og lítið á avgerðir teirra. Hetta lættir um, sigur Hans Fróði. Fólk spyrja meg ofta, hvussu eg havi borið meg at, at fingið hesa avtalu í lag. Men eg haldi, at týdningarmikið er ikki, hvussuleiðis eg eri komin higar, sum eg eri í dag. Tað er eydnast mær, og restin er søga, sigur ein sera stoltur Hans Fróði Hansen.

– Full ferð er á gongdini, og longu um 2 vikur verður høvuðsskrivstovan í Reykjavík latin upp. Vit eru longu 4 fólk í føstum starvi, sigur Hans Fróði.

### Ball saman við stjørnunum

– Tá avtalan varð komin undir land við Alexis og mær, fóru vit til ein stóran føðingardag, sum var bert fyri innbodnum. Vit vórðu koyrd til eini sera snotulig hús í einari sera vakrari limousine. Tann, ið koyrdi bilin var vanliga bilførari hjá Paris Hilton, Justin Timberlake og mongum øðrum. Eg hitti m.a. Snoop Dog, Carmen Elektra og Janet Jackson. Tað var bara stuttligt at síggja og tosa við tey, greiðir Hans Fróði frá.

– Tá eg skuldi flúgva heim til Føroyar aftur, beyð sami bilførari seg til at koyra meg á flogvøllin. Eg varð síðani koyrdur á flogvøllin í einum stórum, snotuligum bili við myrkum rútum. Tað var minningarríkt at kenna seg sum eina verulig stjørnu í nakrar minuttir, sigur Hans Fróði. "My 60 seconds of fame".

### Gjøgnumhugsað konsept

– Eg havi tilrættalagt eitt sera gjøgnumhugsað konsept, ið eg havi arbeitt við í eini 3 ár. Eg havi